**SKYN**



# Sethús

## Heiðagøta 12, 370 Miðvágur

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 301 | 1055 | 3 | 6 | 08/18 |

Talan er um eini arkitektteknað sethús við íbúð í kjallaranum – eitt heim við fleiri enn 300m2, ið má upplivast. Innrættingin av ognini er helst eindømi í Føroyum, og finnast lutir sum m.a. bogaðir veggir og versailles-panelir, ið geva ognini eina serstaka og stásiliga kenslu.

Miðhæddin er innrættað við duri, alrúmi, kamari, vesi, vásakøki, trappugongd og spiraltrappu. Ovasta hæddin er innrættað við trappugongd, gongd, baðirúmi, tveimum kømurum, hjúnarkamari v/baðikari. Útsýnisstova er eisini í ovastu hæddini. Stovan er skild frá restini av hæddini og hevur egna atkomu úr spiraltrappuni í miðhædd.
Niðasta hæddin er innrættað við duri, gongd, køki, stovu, baðirúmi, vesi, fýrrúmi og tveimum kømurum.

Ognin hevur framúrskarandi útsýni og liggur friðarligt við endan av blindum vegi.

## Prísuppskot 3.600.000 kr.

Dømi um fígging: Afturgjaldstíðin er 25 ár

| | |
|---|---|
| Útgjald, 10% | **360.000 kr.** |
| Mðr. gjald – áðrenn rentustuðul | **15.425 kr.** |
| Mðr. gjald – eftir rentustuðul | **13.930 kr.** |

Útrokningin er vegleiðandi. Vit taka støði í, at rentan er óbroytt alt tíðarskeiðið á 2,75% fyri alla lánsupphæddina, og at rentustuðul er 35%. Rentustuðul verður bert veittur til egnan bústað. Hædd er tikin fyri vanligum kostnaðum, so sum stovningarprovisión, tinglýsing og avgreiðslugjøldum.

## Innanhýsis lýsing av ognini

| | | | |
|---|---|---|---|
| Bústaður á ogn | Heiðagøta 12 | Matrikkul nr. | 220d Miðvágur |

### Kortalmynd



# Lýsing 1

| | |
|---|---|
| Fyriliggur húsaskoðan og seljarans upplýsingar | Ja |
| Bjóðar seljari eigaraskiftistrygging galdandi í 5 ár | Ja |

| | |
|---|---|
| Slag | Sethús |
| Matrikkul | 220d Miðvágur |
| Byggisamtykt | Øki B: Sethúsaøki |
| Grundøki stødd | 1055 $m^2$ |
| Uttandura mát av ognini (vegleiðandi) | 301,5 $m^2$ sambært húsaskoðan |
| Byggiár | Grundin er stoypt í 2008, kjallarahæddin var liðug í 2013 og miðhædd og lofthædd liðugt í 2018 |
| Mát millum gólv og loft (loftshædd) | 2,325m í miðhædd |
| Hæddir | 3 |

| | |
|---|---|
| Tekningar | Vegleiðandi plantekningar til mið- og lofthædd. |
| Stoppikrani | Ja, í kjallaranum |
| El-mátari 1 | Ja, í miðhæddini og í kjallaranum |
| Atgongd til ovasta loft | Ja, úr hjúnarrúminum er loftlúka |
| Kort | Ja |
| Rottangi | Ja, eystanfyri |
| Atgongd til væðing | Nei |
| Eigari/ar síðan | 18.12.2013 |
| Er leigari í ognini? | Nei |
| Nær kann yvirtøkudagur væntast at vera umleið? | Eftir avtalu – annars 3 mðr. |
| Verður ognin vaskað og ruddað áðrenn yvirtøkuna? | Ja |

# Umsiting

| | |
|---|---|
| Framdar umvælingar | Uttari parturin av hitapumpuni er frá 2018.<br>Tikið helluna runt um ognina burtur og drenað í 2021. |
| Møguligar umvælingar | Sí húsaskoðan og seljarans upplýsingar |

# Innrætting

| | | |
|---|---|---|
| Ovasta hædd | 60,3 m$^2$ | Ovasta hæddin er í tveimum lutum ið verða nevndir eystari og vestari lutur:<br>Vestari lutur: trappugongd, gongd, tvey kømur, baðirúm og hjúnarrúm v/baðikar.<br>Eystari lutur: spiral-trappa og útsýnisstova |
| Miðhædd | 130,9 m$^2$ | Durur, alrúm, kamar, vesi, vásakøkur, trappugongd upp og spiraltrappa upp. |
| Niðasta hædd | 110,3 m$^2$ | Durur, gongd, køkur, stova, baðirúm, vesi, fýrrúm og tvey kømur. |
| Annað | Arkitektteknað sethús við sera góðum útsýni bæði eystur- og vestureftir. | |
| Umhvørvi | Náttúruvakurt og friðarligt fyri endan av blindum vegi. Sera stutt er til gøtuna, ið leiðir til Trælanípuna. Somuleiðis er eisini handil nærindis. | |
| Grannalag | Gott | |
| Parkeringspláss | Ja, fleiri | |
| Prísuppskot | 3.600.000 kr. | |

# Lýsing 2

| | |
|---|---|
| Bilhús | Nei |
| Hjallur | Nei |
| Tilbygningur | Ja, trappugongdin og spísirúmið í miðhæddini |
| Tak | Aluminium |
| Loft | Gips í mið- og lofthæddini. Timburprofilar í kjallara. |
| Gólv – undir | Betong undir kjallara og miðhædd. Undir lofthædd er timbur, tó betong í økinum undir baðirúminum. |
| Álegging | Ymisk. Í stovuni í miðhædd eru Versailles-panelir úr eik. Eiki-brettir í miðhædd og lofthædd. Í kjallarahædd eru gólvbrettini úr furu, annars betong. |
| Vindeygu | Timbur |
| Termorútar | Ja |
| Úthurðar | Timbur |
| Klædningur | Timbur |
| Bjálving | Ja |
| Innveggir | Gips og timbur-plátur í mið- og loftshædd. í kjallara betong og timbur-plátur |
| Innhurðar | Timburhurðar úr eik |
| Trappa/ur | Timbur |
| Grund | Betong |
| Rør-/hitaskipan | Kopar og plastik |
| Antenna | Nei |
| Brúsa | Ja, ein í niðastu hæddini og ein í ovastu hæddini. |
| Baðikar | Ja – baðikar er í hjúnarkamarinum í ovastu hæddini |
| Oljufýring | Nei |
| Hitapumpa | Ja |
| Fjarhiti | Nei |

| | |
|---|---|
| Brenniovnur | Nei |
| Luftskipan | Ja |
| Innbygd skáp | Nei |
| Gólvhiti | Ja |
| Køkur | Ja, av merkinum Mayflower |

| | |
|---|---|
| Telefon | Ja |
| Internet | Ja |

## Við í søluni

| | |
|---|---|
| Ovnur | Ja, tveir í miðhæddini og ein í niðastu hæddini |
| Roykhetta | Ja, eitt í miðhæddini og eitt í niðastu hæddini |
| Køli/frystiskáp | Ja, eitt í miðhæddini |
| Frystiboks | Nei |
| Uppvaskimaskina | Ja, ein í miðhæddini og ein í niðastu hæddini |
| Vaskimaskina | Ja, ein í miðhæddini og ein í niðastu hæddini |
| Turkimaskina | Ja, ein í miðhæddini |
| Skrellispann | Ja |
| Postkassi | Ja |
| Annað | Ein eyka heitt-vatns tangi er í fýrrúminum, ið fylgir við í søluni – hesin er tó ikki tilkoblaður skipanina í núverandi løtu. |

## Útreiðslur

| Rakstrarútreiðslur | Litrar/kwt | Kr./mðr. | Kr./ár |
|---|---|---|---|
| El – og orkunýtsla | | 2700kr samlað. | |

Tikið inn

| Navn: | Magnus Herdalur | Tlf.: | 234407 | Dagfesting: | 20.08.2021 |
|---|---|---|---|---|---|

## Kunning og serligar viðmerkingar um ognina og sølutilfar annars

Upplýsingar í bústaðarlýsingini eru givnar eftir eigarans bestu sannføring. Tað kann ikki væntast, at eigarin hevur nøktandi kunnleika til standin og støðuna, hetta eitt nú innlit í rør-, hvs-, el- og kloakkeringsviðurskifti v.m., og má fyrilit takast fyri hesum, og tískil verður altíð mælt til, at áhugaðir keyparar hava serkøn við sær at sýna og gjøgnumganga ognina, áðrenn tey bjóða upp á ognina.

Um húsaskoðan og seljarans upplýsingar fyriliggja, er sera umráðandi, at áhugaður keypari lesur hesi skjøl gjølla, og kannar nærri viðmerkingarnar í hesum skjølum, serliga tá ið tað er frámerkt við KN, S3, S2 og S1, tí at keyparin í útgangsstøði ikki kann gera galdandi møguligar manglar, sum víst verður á í húsaskoðanini (støðufrágreiðingini), og seljarans upplýsingum.

Hesar viðmerkingar eru soleiðis ein kunning um standin á ognini, men eisini ein ábyrgdarfráskriving frá seljarans síðu, ið ikki er møguligt hjá keypara at koma afturumaftur við, eftir at ein avtala um keyp er gjørd.

Fyriliggur tilboð um eigaraskiftistrygging, er umráðandi, at keypari setir seg inn í rættarvirknaðin av hesum, og fylgjurnar av, um viðkomandi velur ikki at taka av tilboðnum. Rættarvirknaðurin av, at keypari velur ikki at taka av tilboðnum, er, at seljari er stillaður sum um tryggingin er teknað, meðan keypari er uttan deknað, og harvið átekur sær ein umfatandi váða.

Nærri kunning um hetta fæst eisini við at seta seg í samband við Skyn, og mæla vit annars altíð til, at keypari tekur av tilboði um at tekna eigaraskiftistrygging.

Dagfest:

Undirskrivað av seljara: